

## FM í amboðsfimleiki

Føroyameistarakapping í amboðsfimleiki fyri lið verður um vikuskiftið í Hoyvíkshøllini. Kvinnur og kvinnuunglingar kappast í morgin klokkan 12, og pinkur og gentur klokkan 15. Sunnudagin klokkan 14 kappast piltar, dreingir, unglingar og menn. Allar kappingarnar leygardagin eru á gólvi, í lopi, bita og forskotnari barru, og sunnudagin eru greinarnar gólv, lop, paralell barra og beinsveiggj, umframt at menninir kappast í ringum og piltar og dreingir á bita.

# Fundast í morgin um FSF

**Parnassið á Hotel Hafnia í Havn verður karmur um fundin á miðdegi í morgin, har fótbóltsfeløgini og starvsnevndin fara at viðgera støðuna í Fótbólts-sambandinum og serliga atgongumerkjamálið hjá aðalskrivaranum**




Hilmar Jan Hansen



Umboð fyri feløgini og starvsnevndin hjá Fótbóltssambandinum hittast á miðdegi í morgin til fundar á Parnassinum á Hotel Hafnia

Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Føroysku fótbóltsfeløgini hava tikið forsetan í Fótbóltssambandinum, Høgna í Stórustovu, upp á orðið, nú hann hevur vent sær til teirra eftir hjálp, tí starvsnevndin er farin í tvíningar í málinum um atgongumerkjasøluna hjá aðalskrivaranum, Ísaki Mikladal.

Í morgin á miðdegi hittast formenninir í feløgunum saman við starvsnevndini á fundi, sum verður á Parnassinum á Hotel Hafnia. Hóast áheitanin er komin frá forsetanum, skilst á fleiri formonnum, at tað eru feløgini sjálv, ið hava tikið stig til fundin, men hava heitt á forsetan um at kalla inn.

Á fundinum, sum fevnir um politiska partin av Fótbóltssambandinum og ikki tann umsitingarliga, fáa bæði feløgini og starvsnevndin høvið til at siga sína hugsan, so støðan í Fótbóltssambandinum verður lýst væl og virðiliga. Ikki er tó greitt, um ætlanin við fundinum er at koma við nakrari ávísari niðurstøðu, men at talan meira er um kunning og orðaskifti um heildina.

Síðani Høgni í Stórustovu mikudagin sendi feløgunum bræv, har hann heitti á tey um at skera ígjøgnum, nú ósemja var í starvsnevndini um, hvussu málið um Ísak Mikladal skuldi handfarast, hevur lítið verið at hoyrt frá meirilutanum í starvsnevndini, sum telur Niklas á Líðarenda, Rúna Heinesen, Karl Vidtfeldt, Magnus á Stongum og Niclas Davidsen. Í gjár hevði Rás 2 tó samrøðu við Niklas á Líðarenda, sum lesast kann um aðrastaðni á hesi síðu.

Men sum skilst á fleiri formonnum, skuldi meirilutin í dag koma við einum skrivi til feløgini, ið onkursvegna kann væntast at vera eitt slag av einum svarskrivi, sum lýsir hina síðuna av málinum. Tó var einki skriv enn komið, tá blaðið fór til prentingar.



Niklas á Líðarenda, varaforseti í Fótbóltssambandinum, heldur tað vera óheppið, at Ísak Mikladal er blivin blandaður upp í málið um EM-atgongumerkini til ukrainar, men samstundis heldur hann, at málið er blást upp til at vera meira, enn tað er

Mynd: Fótbóltssambandið

# Hetta er eitt persónsmál

**– Hetta er eitt øgiliga órógvandi mál, sum er blást upp til at vera stórt, og tað tænir ikki føroyskum fótbólti. Eingin í starvsnevndini setti nakað spurnartekin ella gjørdi nakrar viðmerkingar til málið, tá tað var lagt fyri starvsnevndina í mai, sigur Niklas á Líðarenda, varaforseti í Fótbóltssambandinum**




Hilmar Jan Hansen

Síðstu dagarnar hevur málið um Ísak Mikladal, aðalskrivara í Fótbóltssambandinum, fylt nógv í fjølmiðlunum, men hóast hetta, so heldur varaforsetin í Fótbóltssambandinum, Niklas á Líðarenda, ikki málið hava so nógv upp á seg, sum tað er gjørt til.

– Hetta málið er øgiliga órógvandi mál, sum er blást upp til at vera stórt, og tað er ikki nakað, sum tænir føroyskum fótbólti. Málið bleiv lýst á einum starvsnevndarfundi í mai, har allir vóru við, men tá setti eingin nakað spurnartekin við nakað ella gjørdi nakrar viðmerkingar, segði varaforsetin í gjár í samrøðu við Rás 2.

– Eisini hevur ein av monnunum hjá UEFA sagt mær, at hatta málið var einki mál og hevði einki upp á seg. Tí havi eg heldur ikki gjørt meira við tað.

Samstundis ásannaði Niklas á Líðarenda, at Ísak Mikladal ikki hevur borið seg rætt at frá fyrstan tíð, og at hann ongantíð átti at verið farin upp í hetta við atgongumerkjunum til ukrainar yvirhøvur.

– Eina ella aðrastaðni er hetta eitt privat mál hjá aðalskrivaranum, eitt persónsmál, sum eg ikki ordiliga dugi at síggja, at vit skulu viðgera. Men tað er øgiliga óheppið, at hann er farin upp í tað, segði Niklas á Líðarenda.

– Stórur partur av nevndini metir ikki, at aðalskrivarin skal revsast so hart, sum aðrir partar av nevndini vilja. Tá vit høvdu fundin týskvøldið, var stórur partur av nevndini við uppá at geva manninum eina átalu fyri hetta og vóna, at hetta ikki kom fyri aftur. Men tað eru óivað aðrir, sum ikki vilja tað.

### Vánaligt stev

At forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu, nú hevur vent sær til feløgini kring landið at taka eina støðu í málinum, heldur Niklas á Líðarenda onkursvegna avspegla ta sannroynd, at stevið millum forsetan og aðalskrivaran ikki hevur verið nóg gott, eins og tað heldur ikki hevur verið nóg gott í starvsnevndini sjálvari.

– Frá degi eitt hevur tað verið øgiliga ringt at fingið stev í starvsnevndini. Nógvar niðurstøður og nógvar samtyktir eru gjørdar, men einki av tí er sett í verk. Aðalskrivarin, sum er eitt arbeiðsgrev av tí aðru verð, hevur ein vilja til at seta nøkur ting í verk, men tað hevur illa borið til, tí hann og formaðurin sampakka ikki, heldur varaforsetin.

– Tað er ein tapari í hesum, og tað er føroyskur fótbóltur. Um Ísak fer ella onkur annar, so tænir tað ongum endamáli. Vit mugu fáa okkurt konstruktivt fram, so vit kunnu koma víðari.